


## Polterabend á sjómannadegi

Onkur helt á Føroya Sjómannadegi, at Heini O. Heinesen, sum var hetjan hjá fiski-og útróðrarmonnum fríggjadagin, longu hevði fingið minnisvarða á Stongunum. Á veg til setanina av degnum, møttu vit hesum unga manni, sum stóð í oljuklæðum og sydvesti – við stórum togenda um kroppin og varpi í hond. Frammanfyri sær hevði hann eitt skelti við áskriftini: “X við Hoyna – 0%”. Vit fregnaðust, hvussu hetta hekk saman, men skjótt komu vit eftir, at talan var um ungan mann, sum skal giftast í næstum, og nú høvdu vinmenn hann til polterabend. Sigast má, at høvið var væl valt – júst á Føroya Sjómannadegi og við setanina, har nøkur túsund fólk vóru savnað. Líkamikið. Hetta sá bara heilt stuttligt út, men um ungi maðurin stuttleikaði sær líka væl og tey, sum gingu framvið honum, sigur søgan einki um.

vilmund

# Eitt tiltak fyri landið

**Tað var borgarstjórin, sum leygarmorgunin beyð fólki vælkomin á Føroya Sjómannadag og til hátíðarhald hjá Klaksvíkar kommunu**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Steinbjørn O. Jacobsen segði, at hetta er fjórðu ferð - og fjórða árið á rað - at fiskivinnuhøvuðsstaður føroyinga bjóðar øllum føroyingum til Føroya Sjómannadag.

- Hesir árligu hátíðardagar fyri høvuðsvinnu okkara eru soleiðis komnir fyri at vera, og tað fegnist eg um.

Hann segði, at klaksvíkingar eru sera fegnir um, at Føroya Sjómannadagur í roynd og veru er vorðin eitt tiltak fyri alt landið.

### Viðkomandi dagur

- Einki kann vera meira viðkomandi og sjálvsagt enn tað, at tey, sum búleikast og virka í fiskivinnuni, taka hesar dagar úr kalendaranum, leggja amboð og skyldur frá sær eina løtu og taka sær av løttum saman við starvsfeløgum og fólki annars.

Borgarstjórin segði, at Klaksvíkin kennur tað sum ein heiður og eina gleði at kunna bjóða Føroya fólki hjartaliga vælkomin at vitja fiskivinnuhøvuðsstað føroyinga.

- Eg vóni, at vit fáa nógvar góðar løtur saman, bæði til gamans og álvara, segði Steinbjørn.

### 100-ára hald

Hann vísti á, at sum nakað serstakt í ár fellir sjómannadagurin í ein ávísan mun saman við, at Klaksvíkar kommuna í ár hátíðarheldur, at 100 ár eru liðin, síðan kommunan gjørdist sjálvstøðug.

- Uttan at blanda hesi sjálvstøðugu tiltøk saman, vil eg sjálvandi eisini bjóða øllum føroyingum vælkomnum til tey tiltøk, sum okkara lokala 100-ára hátíðarhald bjóðar, segði Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, tá hann beyð vælkomin leygarmorgunin.



*Borgarstjórin bjóðaði øllum føroyingum vælkomnum til Klaksvíkar at halda Føroya Sjómannadag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Málið um setanina av Føroya Sjómannadegi var uppi á hægsta stigi og vendi, men øll útlit vóru til, at alt fór at tørna væl út, sigur løgreglumaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Øll vóru blíð við Tobba í Klaksvík

**- Klaksvíkingar vóru ógvuliga blíðir og fyrikomandi, og eg merkti ongar sum helst óbehagiligheitir, meðan eg var í Klaksvík á Føroya Sjómannadegi**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fólk kring landið og ikki minst í Klaksvík vóru eitt sindur spent eftir at fáa at vita, um Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fór at fáa frið at halda setanarrøðuna á Føroya Sjómannadegi leygarmorgunin.

Men her gekk alt upp á stás.

Tórbjørn byrjaði setanarrøðuna við at siga, at hann ongantíð helt, at tað fór at vera neyðugt við danskari verju til at seta Føroya Sjómannadag í Klaksvík.

- Í besta føri hevði eg kanska væntað, at onkur fór at rópa buhh... eftir mær, men at fáa sær danska verju móti útróðrarmonnunum í Klaksvík - nei, tað visti eg fór at vera púrasta óneyðugt, segði hann.

### Væl móttikin

Nakrar tímar eftir setanarrøðuna ringdi vit til landsstýrismannin fyri at fregnast, hvussu honum nú hevði gingist millum norðoyingar og vitjandi annars á sjómannadegnum.

- Jú, klaksvíkingar eru ógvuliga blíðir og fyrikomandi, og eg havi ongar sum helst óbehagiligheitir merkt her norðuri, síðan eg kom norður í morgun. Tvørturímóti. Eg eri ógvuliga væl móttikin, og fólk eru óføra prátingarsom, eisini um tey mál, sum vóru frammi í løgtinginum hesar dagar, nú neistar fuku millum politikarar og millum politikarar øðrumegin og útgerðarmenn, fiski-og útróðrarmenn hinumegin.

Tóbrjørn segði seg hava møtt fleiri av fiski-og útróðrarmonnunum, sum vóru í løgtinginum, og hann segði seg hava skift orð við hesar menn um, hvussu man møguliga kann tillaga fiskidagaskipanina, so eingin ivi verður um, at teir, sum eru veruligir aktørar í vinnuni, fáa bestu og tryggastu umstøður.

### Meira kunning

- Onkur nevndi, at landsstýrismaðurin møguliga skuldi komið út í økini at skift orð um tær tillagingar, sum neyðugar verða innan karmarnar av fiskidagaskipanini. Hetta eru tillagingar, sum vit eiga at gera, áðrenn málið um áseting av fiskidøgum kemur fyri aftur á løgtingi komandi summar.

Tórbjørn vísir á, at lógin um vinnuligan fiskiskap krevur, at landsstýrismaðurin leggur fram uppskot um fiskidagar, soleiðis at hesir eru samtyktir á Føroya løgtingi, áðrenn nýtt fiskiár byrjar 1. september.

- Nú hava vit so stundir til at fremja tær tillagingar, sum skulu til fyri, at vinnan gerst meira trygg við umstøðurnar, sigur landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen.



*Stutt eftir setanarrøðuna, var Tórbjørn Jacobsen í práti við Kristian Martin Rasmussen, reiðara og skipaeigara*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Á hægsta stigi

Sosialurin tosaði eisini við løgreglumann á Stongunum beint eftir setanina av Føroya Sjómannadegi. Tríggir løgreglumenn fylgdust hesa løtu, men hildu seg langt afturi í fólkarúgvuni – og langt frá sjálvum røðarapallinum, har Tórbjørn Jacobsen helt sína setanarrøðu.

- Jú, tað er rætt, at hetta málið hevur verið uppi á hægsta staði og vent, og mett hevur verið um umstøðurnar. Nú setanarmorgunin kom, hildu vit útlit vera til, at alt fór at spæla friðarliga av, sum tað eisini gjørdi, sigur ein av løgreglumonnunum, vit tosaðu við.